## Skeiva vegin hjá Vestas

Fær tann stóra danska vindmylluverksmiðjan Vestas ikki fleiri bíleggingar um stutta tíð, noyðist leiðslan at siga fleiri starvsfólkum upp. Tað skrivar Berlingske Tidende. Vestas hevur í løtuni 20.000 fólk í arbeiði í Danmark og aðrastaðni, men greinarar siga við Berlingaran, at tað talið fer at minka í næstum, fær fyritøkan ikki fleiri bíleggingar. Í sambandi við roknskapin fyri 2008 segði leiðslan í Vestas seg vænta, at umsetningurin í 2009 verður 7,2 milliardir evrur, men greinararnir hjá Berlingaranum siga, at tað talið fer ikki at halda, um ikki okkurt munagott hendir skjótt.




## Japan styðjar grøna orku

Í Japan umhugsar stjórnin at læna menningarlondum fimm milliardir dollarar, sum tey skulu brúka til útbyggingar innan varandi orku og til onnur umhvørvisvinarlig tiltøk. Stjórnin sigur, at eftir hennara ætlan skulu pengarnir brúkast til vatnorkuverk og sólorkuverk og onnur átøk innan varandi orku í londum í Asia og aðrastaðni. Japanska stjórnin arbeiðir eisini við einum fíggjarligum pakka, sum skal stimbra grøna orku í sjálvum Japan. Ætlanin hjá stjórnini er, at hesin pakkin verður lið í stríðnum at basa fíggjarkreppuni, sum eisini hevur rakt Japan.

# Bjartskygni ræður á Look North í Klaksvík

**Meðan lemjandi fíggjarkreppan fyllir nógv hjá mongum, eru tey meira bjartskygd á fyritøkuni Look North í Klaksvík, har tey serliga framleiða fiskakassar úr flamingo og bjálving til bygging við betongi. – Tað hevur ongantíð gingið betri enn nú, og vit hyggja eftir nýggjum møguleikum – annaðhvørt at keypa ein størri bygning ella at finna okkum eitt øki, har vit kunnu byggja ein størri bygning, sigur dagligi leiðarin á Look North, Ragnar Olsen**



*Ragnar Olsen er dagligur leiðari á Look North í Klaksvík, sum framleiðir fiskakassar úr flamingo. Eisini framleiða teir isolatión til betongelementir og undir betonggólv*

VINNA
*Orð: Leo Poulsen/ Vilmund Jacobsen*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Sosialurin hevur hitt Ragnar Olsen, ið er dagligur leiðari á virkinum Look North í Klaksvík, sum serliga framleiðir flamingokassar til fiskaútflutning og bjálving til ymiska bygging.

– Framleiðslan á virkinum byrjaði í 2001. Hetta var í sambandi við, at eitt kryvjivirki eisini fór í gongd her norðuri. Tað var felagið Faroe Salmon, og Look North byrjaði í samstarvi við hetta felag. Alifelagið átti eisini part í hesum virkinum.

Ragnar Olsen sigur, at samstarvið vardi yvir eina tíð, og tað gekk væl, til alivinnan fekk eitt av sínum stóru bakkkøstum, og hetta felag eins og mong onnur fór á húsagang.

Hann sigur, at síðan Faroe Salmon bleiv selt og teir, sum keyptu, høvdu sína egnu framleiðslu av kassum, hevur Look North ikki leverað til felagið.

- Vit hava í staðin funnið okkum onnur bein at standa á, og nú koyrir virkið aftur heilt væl eftir, at tað hevur gingið tungt í nøkur ár.

Dagligi leiðarin vísir á, at tað fyrst og fremst eru kassar til fiskaútflutning, sum virkið framleiðir, og hetta eru serliga kassar til laksavirkini.

Hann metir, at framleiðslan av kassum til útflutnings av laksi stendur fyri umleið 40-50% av framleiðsluni.

- Men vit framleiða eisini kassar til annan fiskaútflutning enn laks, og ein partur av hesum fer til botnfiskasløg og feskar fiskavørur úr botnfiski.

### Bjálving úr flamingo

Ein partur av framleiðsluni hjá Look North í Klaksvík er bjálving, sum nú er vorðin ein hampiligur – og spennandi - partur av framleiðsluni.

- Nú stórt fokus er á orkusparandi tiltøkum um allan heim, vænta vit, at hesin parturin av framleiðsluni kemur at vinda upp á seg. Hóast byggivirksemið í løtuni ikki er so stórt, vænta vit kortini ikki, at minni verður at gera á hesum øki, sigur Ragnar.

Tá flamingo er rættiliga eldfimt, spurdu vit dagliga leiðaran, hvussu hetta tilfar verður brúkt í bjálvingini?

- Sum er, framleiða vit mest til tann partin, sum verður brúktur til bjálving undir gólvum, har stoypt verður oman á. Tá er eingin trupulleiki við hesum tilfari, og tá er hetta ivaleyst minst líka so góð bjálving sum onnur bjálving.

Hann vísir á, at flamingo er meira vatnskýggjandi enn annað tilfar, vit fyritøkan kappast við. Tí meta tey, at hetta tilfar er sera væl egnað, og flamingo er eisini góðkent til slíka bjálving.

- So leingi, sum flamingo er “innkapslað” í betongi, sum Ragnar tekur til, er tað lógligt at brúka, og vit selja soleiðis eisini flamingo til eitt nú elementvirkir.

### Breitt úrval

Ragnar Olsen sigur, at Look North hevur eitt rímiliga breitt úrval av kassum til fisk og fiskavørur.

- Kanska kunnu vit siga, at stóra úrvalið viðhvørt er ein trupulleiki, tí tað tekur tíð at skifta millum ymisku formarnar, og tá skalt tú eisini hava eina hampiliga vørugoymslu til ymisku sløgini av kassum.

Dagligi leiðarin vísir á, at Look North í øllum førum hevur eini 12 ymisk sløg av kassum.

- Eftirspurningurin eftir støddunum er sjálvsagt ymiskur, men felagið hevur